**VALGREINAR**

## Vinstra ella Høgra?

**Bent J. Hansen**
*valevni fyri Sambandsflokkin í Suðurstreym*



Javnaðarflokkurin vil fegin fevna ógvuliga víða. Nú er hann vorðin so breiður, at hann er komin í stríð við seg sjálvan.

Javnaðarflokkurin er ein socialistiskur flokkur. Socialisma er ein skipan, sum byggir á kollektiva ognarrætt til jørð og framleiðsluvirkir, soleiðis at framleiðsla og býti av sama kann verða undirlagt almennari stýring og kontrol. Hendan politiska áskoðan er høvuðsorsøkin til, at Javnaðarflokkurin er so nógv ímóti privatisering.

Borgarligu flokkarnir, mótvegis teim socialistisku ganga inn fyri fíggjarligum frælsi fyri einstaklingum. Skal tað almenna taka sær av øllum, verður ábyrgdin og arbeiðshugurin tikin frá einstaklinginum.

Borgorligi flokkurin í Danmark »Venstre« hevur í mong ár brúkt lýsingartiltakið »Mennesket frem for Systemet«. Nú hevur Javnaðarflokkurin nápað Venstres slogan, og umskrivað tað til »FÓLKIÐ FYRST«.

Øll vita at Javnaðarflokkurin gjøgnum árini hevur skift nakað ímillum samríki og loysing.

Og nú mega vit eisini spyrja um Javnaðarflokkurin er vorðin ein høgraflokkur?

Nær finnur Javnaðarflokkurin sítt endaliga støði?

## Stórar ógoldnar rokningar til komandi samgongu

**Atli Hansen**
*Vallevni fyri Sambandsflokkin í Eysturoy*



Í hesum valskeiðinum hevur samgongan økt rakstrarútreiðslurnar við tilsamans 960 mió. kr. ella í meðal 240 mió. kr. um árið. Samstundis hevur hon minkað inntøkurnar av blokkinum við uml. 360 mió. kr. Tilsamans rokningar fyri uml. 600 mió. kr., sum føroyingar skulu gjalda meira hvørt einasta ár framyvir. Umframt hetta eru eisini nakrar stórar íløguætlanir, sum skulu gjaldast og yvirtøkur, sum eru framdar í valskeiðinum.

Tann samgongan, sum tekur við eftir hesa, kemur at standa við eini fíggjarlóg við halli, so haðani er ikki nógv at gjalda við.

Fyri at koma burtur úr tí fíggjarliga óførinum, sum henda samgongan hevur komið okkum í, er tí neyðugt at skapa fleiri og størri inntøkur til at gjalda nevndu rokningar við. Eingin fær arbeitt við sínum egnu ætlanum fyrr enn skil er komið í kassan aftur.

Næstan allar okkara vinnnur kunnu so ella so sigast at vera avleiddar av fiskivinnuni – í hvussu so er tær flestu av okkara størru framleiðslufyritøkum. Hesar skulu allar hava betri umstøður at arbeiða undir. Vit skulu lætta um ,har sum tað tyngir mest, so at hesar eisini kunnu menna seg til at vaksa um útflutningspartin av teirra virki og harvið skapa størri inntøkur til okkara samfelag. Sambandsflokkurin fer at ganga á odda fyri at betra um karmarnar hjá hesum fyritøkum.

Ein krossur fyri Sambandsflokkinum verður soleiðis eitt ja til aktivan vinnulívspolitikk og harav fylgjandi vøkstur í búskapinum.

## Kvinnur á fremsta bonk

**Hildur Patursson**
*valevni tjóðveldisfloksins í Suðurstreymoy*



Í hjarta mínum býr frælsið. Tað er so sjálvsagt, sum at anda inn og at anda út.

Og eg trúgvi upp á framfýsnið í føroysku tjóðini.

Tað er føroyska fólkið sjálvt, sum hevur reist seg aftur úr heimastýriskreppuni eftir stuttari tíð.

Eingin kann taka tann heiðurin frá okkum.

Saman hava vit lært at standa á egnum beinum.

Saman hava vit føroyingar ment samfelagið, so eingin ivi er um, at tað kann bera seg sjálvt.

Við okkara egna ágrýtni hava vit bygt upp álitið á okkum sjálv, so vit ikki ivast í, at vit eru før fyri at taka ábyrgdina av øllum okkara viðurskiftum.

Tí ræður nú um at standa saman.

Vit mugu fáa tey valevni inn á ting, sum vilja verja vunnin rættindi og sum kenna skylduna og hava viljan til áhaldandi arbeiði, so vit sum skjótast hava fult ræði á og fulla ábyrgd av øllum viðurskiftum í okkara framkomna vælferðarsamfelag.

Vit mugu tryggja okkum, at vit fáa fjølbroytt menningarsjónarmið inn á ting, og tí er tað so umráðandi, at tingið eisini verður styrkt við teimum sjónarmiðum, sum kvinnur kunnu ríka politiska lívið í Føroyum við.

Í hjarta mínum býr framburðurin hjá øllum føroyingum. Tí kann annar helmingurin ikki standa uttanfyri, tá ið avgerðirnar verða tiknar á tingi.

Eg eri sannførd um, at fleiri kvinnusjónarmið høvdu broytt nógvar avgerðir, sum verða tiknar á tingi, tí raðfestingin hevði verið øðrvísi.

Eg eri sannførd um, at eitt løgting, javnsett við kvinnum og monnum hevði verið eitt ríkari løgting, Vit kvinnur síggja møguleikar, sum kunnu vera truplir á fáa eyga á við mannfólkaeygum.

Hugsið um tað, bæði kvinnur og menn, tá ið tit seta krossin valdagin. Hetta er lagnuval.

Lurtið eftir hjartanum.

Veljið frælsið og fylkist um kvinnur, sum vilja tað sama sum tit.

## Lærari ella lagnusmiður

**Mourits Joensen**

Skal barnið í fólkaskúlanum undirvísast av politikara?

Skal lærari, sum arbeiðir við tí dýrabarasta vit eiga, barninum, hava loyvi til at taka lærarastarvið sum hjástarv?

Skal fólkaskúlalærari hava loyvi til at stilla upp til løgtingsvalið?

Hví skal skúlabarnið vera uttan frálæru, tí lærarin er í tinginum?

Hví skal skúlabarnið hava ein vikar nú og annan tá, tí lærarin nýtir arbeiðsorku sína til egin politisk áhugamál?

Hví skal skúlabarnið undirvísast av lærara, ið kemur troyttur og illa fyrireikaður av politiskum fundum?

Hevur lærari, sum ynskir at nýta sína arbeiðsorku í tinginum, ikki misskilt sína uppgávu sum lærari?

Tín atkvøða fyri einum fólkaskúlalærara til løgtingsvalið, kann gerast eitt lagnuval fyri skúlabarnið!

Børn eru viðbrekin, og skulu hava tryggar og fastar karmar, og viðfarast við umhugsni, eisini í skúlanum!

HUGSA UM BØRNINI, TÁ TÚ SETUR KROSS TÍN Á LØGTINGSVALINUM!

Nógv ræðandi dømi eru, har lærarin og politikarin hevur misrøkt lærarastarvið upp á tað grovasta. Í smábygdum hava vit dømir um, at lærarin og politikarin hevur sitið einsamallur, har hetta hevur havt ógvuligar avleiðingar fyri heilar skúlaflokkar. Tú kanst steðga hesum óskili við atkvøðu tínari!

Gott løgtingsval!

## Skipaður stættamunur í Føroyum

**Hans Birgir Hansen**
*Mr. Big*



Vit hava skipað stættarmun millum yvirvalds, miðal og arbeiðara stættir, tey mánaðar og tímaløntu og tey undirløntu úti á arbeiðsmarknaðum í øllum landinum.

Vit fáa ikki øll eins góðar fortreytir/grundarlag/lívsmøguleikar sum tey vælbjargaðu í samfelagsligum høpi innan rikna familju, vina og kenningarpolitikin í dag. Vit fáa ikki øll eina rættvísa viðferð av avgreiðslufólki hjá tí almenna, landi, kommunu, privata, ríkið, í dagligum gerðarmálum, tá vit skulu greiða skyldurnar. Vit uppliva diskriminatión, mótvegis viðskiftafólki, tá ið munur verður framdur av høgum/lágum í samfelagsligum høpi ein finst harðliga at í lesarabrøvum. Vit vera ikki øll góðkend og virðismett eins úti í øllum skipaðum lívsviðurskiftum, og tí dagliga gerandislívi, í øllum landinum hvat í øllum verður gjørt greitt.

Vit eru ikki øll eins fyri teimum galdandi lóggávum, skipanum, mannagongdum, rættindum, skyldum, innan áðurnevndu, ein ger vart við í bløðum og túnatosi.

Vit fáa ikki skipað føroyska rættartrygd og rættarsamfelag, ið donskum ríkisfelagsskapi, sum støðan í dag er mótvegis teimum minni mentu og veiku. Vit røkja ikki øll okkara samfelagsskyldur mótvegis okkara medmenniskjum í tí dagliga arbeiði og gerandislívinum.

Vit skulu koma øllum tí skipaða stættarmuni til lívs hvat ein kemur í lesarabrøvum og í túnatosi millum manna og úti á kjakfundum tá ein fær orðið.

Vit kunnu øll læra av lívsroyndum hjá hvørjum øðrum við atliti til skipaða stættarmunin í Føroyum.

# ítróttur

Nr. 74 • fríggjadagur • 19. apríl 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Sterku mennnir eru funnir



*Zydranus Zavickas varð í fjør álvarsliga skaddur í knænum, tá hann royndi seg í Mill-Walk, men nú fer hann fyri fyrstu ferð síðani hetta at royna seg, tá Atlantic Giant 2002 verður hildin*

**Regin Vágadal hevur boðað frá, hvøjir teir 10 menninir eru, sum seinast í hesum mánaðinum fara at dystast um heitið sum Atlantrisin 2002**

STERKIR MENN

*Jákup Mørk*

26. og 27. apríl verður árliga kappingin, Atlantic Giant, hildin. Í ár er kappingin býtt upp soleiðis, at fyrri parturin verður hildin í Ítróttahøllini í Runavík, og leygardagin verður so dystast í høllini á Hálsi í Havn.

### Sera hørð kapping

Sum vant, so verður talan um nakrar av fremstu íðkarunum í heiminum innan yrki, tá farið verður í gongd. Svend Karlsen, sum í fjør gjørdist heimsins sterkasti maður, og sum eisini áður hevur vunnið kappingina, er aftur hesa ferð við, og uttan iva verður hann av teimum flestu roknaður sum favorittar at vinna.

Hinir niggju luttakararnir hava allir verið í finaluumfarinum til at gerast heimsins sterkasti, so einki er at ivast í, at talan verður um eina sera harða kapping. Listin við luttakarum framgongur aðra staðni í síðuni, men tað kann viðmerkjast, at fyri ein av hesum verður talan um eina heilt serliga kapping. Zydranus Zavickas varð álvarsliga skaddur, tá hann í fjør tók lut í kappingini, men nú er hann komin somikið væl fyri seg, at hann aftur sær seg føran fyri at taka lut í slíkum kappingum, og hvat er tá meira náttúrligt, enn at byrja, har sum alt fyribils endaði hjá honum.

Um seg sjálvan sigur Regin annars, at hann er so toluliga væl fyri. Seinastu tíðina hevur hann fyri tað mest vant við at runnið, soleiðis at hann kann gerast nakað skjótari, og tó at hetta hevur gjørt hann nøkur kilo léttari, so metir hann, at alt í alt er hann kanska vorðin nakað sterkari í nøkrum greinum, so spennandi verður at vita, um han aftur í ár kann røkka tindunum í egnu kapping sínari.

### Greinarnar

Um greinarnar er at siga, at tær eins og vanligt eru sær sjálvum so hampuliga líkar. Fyrra kappingardagin skulu luttakararnir royna seg í bonkpress, sum ikki er roynt í Føroyum áður. Hetta verður mett sum ein av mest undirhaldandi kappingargreinunum, tí innan eitt ávíst tíðarbil skulu sterkur menninir lyfta 185 kilo so ofta sum gjørligt.

Síðani verður talan um deadlift, har tað ræður um at lyfta tyngstu byrðuna, áðrenn tvær sera væl úmtóktar kappingargreinar eru á skránni. Hesar kappingin í at lyfta steinar upp á nakrar plattar, og so vanligu "loading-event" kappingina, og ikki minst er tað í hesum báðum, at Regin Vágadal er sera sterkur, so vónandi fáa føroysku áskoðararnir høvi til at heiðra Regini undir hesum kappingum.

Sunnudagin verður lagt fyri við Deadlift, har tað ræður um at halda einum hálvum tonsi uppi frá so leingi sum gjørligt. Síðani verður farið víðari til Loglift, sum er mest átøkt vektlyfting. Seinastu tríggjar greinarnar eru aftur nakrar, har Regin vanliga stendur seg væl. Fyrst er tað Truck-Pull, síðani Wheel-Flip, og at enda verður talan um sonevndu Mill-Walk, har gingið verður runt ein aksa við eini vekt upp á 350 kilo.

### Atlantic Giant 2002 - luttakaralisti

| | | |
|---|---|---|
| Svend Karlsen | Noreg | Heimsins sterkasti maður 2001 |
| Wout Zilstra | Holland | Finalistur til HM |
| Torfi Ólafson | Ísland | Finalistur til HM |
| Zydrunas Zavickas | Letland | Finalistur til HM |
| Rene Minkzitz | Danmark | Finalistur til HM |
| Regin Vágadal | Føroyar | Finalistur til HM |
| Odd Haugen | Hawaii | Finalistur til HM |
| Juha Rassunen | Finland | Finalsitur til HM |
| Heinz Ollesch | Týskland | Finalistur til HM |
| Ireneusz Kuras | Póland | Finalistur til HM |

**Dómarir:**

| | |
|---|---|
| Jamie Reeves | England |
| Ilkka Kinnunen | Finland |

## Hareide til Rosenborg

Mánadagin boðaði táverandi venjarin hjá oddaliðnum í donsku superliguni, Åge Hareide, frá, at hann segði seg úr venjarasessinum. Orsøkin til hetta var, at munurin niður til FCK var minkaður niður í tvey stig, og sjálvur segði norski venjarin, at hann ikki kendi seg hava meira at geva leikarunum, soleiðis at gongdin kundi vendast.

Hareide slapp tó ikki at ganga leysur leingi, tí mikukvøldið boðaðu hann og norska stórfelagið, Rosenborg, frá, at Åge Hareide alt fyri eitt verður settur í starv hjá Rosenborg.

Annars hevur verið gitt, at Hareide skuldi gerast venjari komandi ár hjá Rosenborg, nú Niels Arne Eggen hevur boðað frá, at hetta verður seinasta ár hansara í felagnum, men leiðslan og Eggen komu ásamt um, at tað helst var betri, um samstarvið steðgaði alt fyri eitt.

**-jm**

## Byrial skoraði

**Johan Byrial Hansen skoraði, tá Fredericia mikukvøldið spældi javnt móti Køge**

DANMARK

*Jákup Mørk*

Tað var ikki væntandi, at Fredericia kundi geva Køge stórvegis mótstøðu, tá liðini hittust. Fredericia er í løtuni beint undir niðurflytingarstrikuni í deildini, og Køge er oddalið, men hetta løgdu teir á heimaliðnum vertin á.

Longu eftir 12 minuttum var føroyski landsliðsmaðurin á blettinum, og tó at Køge javnaði til 1-1 um hálvan fyrra hálvleik, so svaraði Fredericia heilt skjótt aftur, við máli sum Brian Jochumsen skeyt.

Tað eydnaðist tó oddaliðnum at fáa javnleik, tá Martin Retov í seinna hálvleiki skoraði upp á brotsspark, men alt í alt má hetta tó metast sum eitt gott úrslit hjá Fredericia.

Í samlaðu støðuni broytti hetta tó ikki stórvegis. Køge er enn á odda, trý stig undan næsta liðinum, og Fredericia er framvegis á triðniðasta sessinum. Teir eru tó bert eitt stig frá B93.